# Dansiteatur á Asfalt

ASFALT

Fríggjakvøldið klokkan 20:00 og leygarkvøldið klokkan 22:30 fara tíggju ung fólk á pallin frammanfyri Margarinfabrikkina at framføra eitt tiltak, ið tey sjálvi kalla dansiteatur.

Í framførsluni verða brot og løtur úr gerandisdegnum lýstar í dansi, sjónleiki og sangi. Har eru góðar og vakrar løtur, men flestu løturnar eru merktar av harðskapi, máttloysi og einsemi. Evnið í leikinum er harðskapur móti kvinnum - ein heimsumfatandi trupulleiki, sum Amnesty International Føroya deild, við hesum tiltaki, ynskir at varpa ljós á.

Føroya deild hevur luttikið í altjóða átakinum "Steðgið harðskapi móti kvinnum" síðani 2004. Átakið snýr seg ikki bert um at broyta paragraffir, men eisini hugburð, fordómar og siðvenju, sum viðvirka til at harðskapur móti kvinnum heldur fram kring allan heimin.

Tiltakið á Asfalt er ætlað sum eitt alternativt ískoyti til at skapa tilvitan og kunning um harðskap móti kvinnum. Amnesty Føroya deild heitti í hesum sambandi á Rúnu Aref, sum áður hevur skipað fyri dansiteatri, um at standa fyri tiltakinum á Asfalt. Rúna hevur í samstarvi við Búa Rouch, Edith Dahl Jakobsen og Tjóðhild Patursson evnað til innihaldið og koreografiina í leikinum, sum hóast álvarsama evnið eisini rúmar vón og møguleikanum fyri betraðum broytingum.

Til ber at lesa meira um tiltakið á heimasíðuni hjá Amnesty, www.amnesty.fo <http://www.amnesty.fo/> og á heimasíðuni hjá Asfalt, www.asfalt.fo <http://www.asfalt.fo/>

## FAKTA

**Koreografi og dansur:**
Rúna Aref & Búi Rouch
Sangur: Edith Dahl Jakobsen

**Dansarar/leikarar:**
Tjóðhild Patursson, Turið Nolsøe, Heiða Nolsøe, Kirstin Helgadóttir, Anna Maria Sloan, Hjørdis Mohr og Bárður Ísheim.

**Hár og smyrsl:**
Marjun Olsen og Eydis Næss (hjálparfólk)




# Lærarastørv í Kaldbaks skúla

### Søkt verður eftir 2 lærarum

1 lærara í fast starv at seta frá 1. august 2007, og 1 lærara í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2007/08 vegna avlopstímar og serligan tørv (um 18-20 tímar um vikuna).

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- verða við áhaldandi at menna skúlan
- eru stundisligir og nærlagdir

Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær at undirvísa í føroyskum, donskum, handaverk og list, kristni og rokning.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu hava læraraútbúgving. Læraralesandi, sum lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan. Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avrit av prógvum og møguligum ummælum, skulu vera fyrstalærara Ragnari J. Magnussen, Hagagøtu 3 á Argjum, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 22. juni kl. 12.00.

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Kaldbaks skúla tel 302520 ella 515398.

**Kaldbaks skúli**
180 Kaldbak

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Bústovnin í Børkugøtu 1

Søkt verður eftir pedagogi til Bústovnin Børkugøta 1 til setan 1. juli 2007 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og talan er um at arbeiða dag-, kvøld-, døgn-, vikuskifti og halgidagar. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er í løtuni Børkugøta 1.

Á bústovninum búgva 6 menningartarnað vaksin fólk, og fleiri teirra hava likamlig brek. Endamálið er m.a. at bjóða teimum góðar og tryggar menningarkarmar. Tað pedagogiska arbeiðið í gerandisdegnum verður tilrættislagt eftir tørvinum hjá tí einstaka.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólrun Arabo, leiðara, á tlf. 311442 ella 229101.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedgogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.
Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Les meira um starvið á www.naerverk.fo/leys størv

**Umsókn:**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V.skal sendast til.
Bústovnurin í Børkugøtu 1
100 Tórshavn
Stílað: Sólrun Arabo, leiðari

**Umsóknarfreist: 25. juni 2007**

Trivnaðartænastan

## Frítíðaravloysarar til bústovnarnar Børkugøtu 1 og Sundsvegur 22, 100 Tórshavn

Søkt verður eftir frítíðarloysarum til Bústovnin Børkugøtu 1 og Sundsveg 22 til setan skjótast gjørligt

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, morgun-, kvøld-, døgn- og vikuskifti.

Á bústovninum Børkugøtu 1 búgva 6 menningartarnað vaksin fólk, og á Sundsvegi 22 búgva 4 menningartarnað vaksin fólk.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Sólrun Arabo, leiðara, á tlf. 311442, 315626 ella 229101

Les meira um starvið á www.naerverk.fo/leys størv

**Umsókn:**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V.skal sendast til.
Bústovnurin í Børkugøtu 1
100 Tórshavn
Stílað: Sólrun Arabo, leiðari

**Umsóknarfreist: 25. juni 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**